Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 9. januar 2004



**Likkulátur** CANAL+

Eftir at maður hennara doyr, kemur Freyja í 50'unum aftur úr USA til lítlu bygdina heima í Íslandi. 11 ára gamla Agga heldur, at okkurt merkisvert og gandakent er við Freyju, og tí fer hon undir at kanna eftir, hvat hon tekst við í gerandisdegnum.

**Mikudagin kl. 19.00**



**Getaway**

Doc McCoy er endaður í fongsli, tí vinir hansara runnu undan honum undir einum ráni, soleiðis at teir sluppu undan sínari revsing. Doc kennir tó ríkmannin, Jack Benyon, og saman við honum ætlar hann sær at gera eitt risastórt rán. Hetta tó treytað av, at Benyon kann fáa seg úr fongslunum.

**Leygardagin kl. 21.40**

**Vetrareingil** SVF

Ein vanlukka við geislavirknum burturkasti á einum avtoftaðum kjarnorkuverki verður uppdagað av umhvørvisverndarfólki, sum búgva í nánd. Og skjótt stendur greitt, at okkurt er heilt galið. Eitt fyri og annað eftir hvørva umhvørvisfólkini í einum veldugum menniskjaskaptum svørtum holi.

**Leygardagin kl. 22.40**

TV Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**